Singer/Songwriter 2003:

# Ronni fyrsti finalisturin

**Við yndisligum sangi og góðum gittarspæli vann Ronni Poulsen seg víðari í kappingini Singer/Songwriter 2003**

TÒNLEIKAKAPPING
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið vann Ronni Poulsen fyrsta innleiðandi umfar av singer/songwriter kappingini hjá Hotel Hafnia. 22 ára gamli havnarmaðurin basti Jógvan A. Jacobsen og Niels Juul Arge leygarkvøldið.

Nú bíðar finalan honum 22. november.

- Eg eri øgiliga, øgiliga glaður beint nú. Hinir báðir vóru sera góðir, og eg haldi ikki, at eg megnaði at spæla fult so væl, sum eg kann. Tískil roknaði eg ikki við at vinna. Tað verður nógv betri til finaluna, segði ein ovurfegin Ronni Poulsen beint eftir, at hann var kosin vinnari.

## Fult hús

Hafnia Lounge var at kalla stúgvandi full, tá Niels Juul Arge sum tann fyrsti setti seg at spæla beint eftir klokkan níggju leygarkvøldið. Fíggjarstjórin hevði funnið sangir fram frá lestrartíðini í Århus. Umframt tvey føroysk kærleiksløg framførdi hann eisini sum triðja og síðsta lag A Whiter Shade of Pale hjá Procol Harum.

Kappingin er soleiðis skipað, at luttakararnir skulu spæla tvey føroysk heimagjørd løg fyrst og eitt lag, sum kann vera á øllum máli, og hetta lag nýtast teir ikki at hava gjørt sjálvir.

Tann áhoyrarin, sum kundi farast gleðast heim av Hafnia, var óivað unnustan hjá Jógvani A. Jacobsen, sum var tann næsti luttakarin leygarkvøldið. Ikki færri enn tríggjar yndisligar og kenslubornar kærleikssangir hevur Jógvan skrivað til hana, og teir sluppu vit øll at hoyra leygarkvøldið. Fólk tóku ógvuliga væl ímóti inniligu framførsluni hjá fuglfirðinginum, sum fekk tíðina at standa stilla ta løtuna, hann spældi.

Tískil var tað alt annað enn lætt hjá Ronni at liva upp til Jógvan, tá hann sum tann triðji setti seg við gittaranum í hugnaliga umhvørvinum í Hafnia Lounge.

Ronni hevur eina framúr góða rødd, og hann er eisini ein stinnur gittarleikari. Eisini sangirnir hjá honum vóru yndisligir. Millum annað hevði hann fingið íblástur úr bókini úr Rannvu. Sum sítt triðja lag hevði hann valt Your Song hjá Elton John.

Styrkin hjá Ronni er fyrst og fremst hansara stóru sangevni, sum áhoyrarnir kundu gleðast um leygarkvøldið.

## Tvey umfør eftir

Eftir at dómararnir høvdu hugsað seg um, varð kunngjørt at Ronni Poulsen hevði vunnið kappingina. Bæði Jógvan Jacobsen og Niels Juul Arge fagnaðu Ronni, og hvørgin teirra var vónsvikin, men hildu møguleikan at vera við í kappingini vera kærkomnan.

Tvey innleiðandi umfar eru eftir, áðrenn finaluna 22. november. 25. oktober verður tað næsta undanumfarið, og síðsti finalisturin verður funnin 8. november. Kappingarnar verða allar hildnar á Hotel Hafnia Lounge. Ùtvarp Føroya tekur upp frá kappingini.



*22 ára gamli havnarmaðurin Ronni Poulsen vann størsta tokkan millum dómararnar og vann fyrsta umfar av Singer/Songwriter kappingini hjá Hotel Hafnia*





**Okkum tørvar ítróttarskrivara**

Dámar tær ítrótt? Dugir tú at arbeiða sjálvstøðugt og liggur væl fyri at skriva?

So ert tú kanska júst persónurin, sum vit sóknast eftir á ítróttaredaktiónini.

Ítróttaskrivingin hevur seinastu nógvu árini verið raðfest ovarliga á Sosialinum, og fyri framhaldandi at halda fast um oddastøðuna á økinum sóknast vit tí eftir einum medarbeiðara. Talan verður í fyrstu syftu um partíðarstarv.

Umframt ítróttarskrivingina á Sosialinum verður partur av uppgávuni røkt av navnaøkinum, www. sportal.fo.

Vit rokna við, at tú hevur ein breiðan áhuga fyri føroyskum ítrótti, herundir ikki minst vetrarítróttargreinum. At tú ert álítandi og hevur góðan kunnleika til føroyska málið, og at tú hevur góð evni at bera teg fram á skrift.

Umsøkjarar við journalistiskari útbúgving hava fyrimun, men er hetta tó eingin treyt.

Er ynski at fáa nærri at vita um starvið, eru áhugaðir umsøkjarar vælkomnir at seta seg í samband við Jonhard Hammer á tlf. 223 369 ella Eirik Lindenskov á tlf. 216 409. Ella við at senda teldubræv til jonhard@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 20. oktober 2003

**Umsóknir skulu sendast til:**

Sosialurin
postsmoga 76
110 tórshavn

Merkið brævbjálvan **»umsókn«**

Sosialurin

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk.
Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna.




# All That Rain á Nabb

TÍÐINDASKRIV

Langt er millum dansitiltøkini í Ítróttarhøllini á Nabb. Nú leygarkvøldið verður tað so aftur eitt rimmar dansikvøld, og tað er eingin minni enn „All That Rain" sum fara at spæla.

„All That Rain" eru kendir fyri at seta rættiligt lív í áskoðarafjøldina og spæla júst tann tónleikin fólk flest dáma bæði at lurta eftir og at dansa til.

Tað eru sera royndir tónleikarar sum manna „ATR", og fyri ikki so langari tíð síðani, kom Pól Arni Holm við í bólkin sum forsangari. Tað vísti seg at vera eitt sera gott „kup" og ikki kann sigast annað enn at bólkurin "ATR" mann vera ein hin besti tónleikabólkurin í Føroyum.

Tiltakið byrjar kl.23:30 og dyrnar latað aftur kl. 04:00.

Tað er "Showtime sound&Lightning" sum stendur fyri PA.ljóð og ljós. Teir hava millum annað leverað ljóð/ljós-útgerð til "G-Festivallin", "Nik & Jay konsertina" og mong onnur størri tiltøk, so tann parturin av tiltakinum verður tað sjálvandi eisini gjørt nógv burturúr.

Bussar koyra til og frá Ítróttarhøllini á Nabb: Frá Vestmanna og Vágunum ber til at bíleggja pláss á tlf. 21 77 52, og úr Eysturoynni á tlf. 21 64 64.



# Fyrilestur á Glyvrum um Føroya Barnaheim

TÍÐINDASKRIV
*Kunningarstovan í Saltangará*

Mikukvøldið 15. oktober kl. 19.00 verður fyrilestur í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag á Glyvrum. Tað eru umboð frá Føroya Barnaheimi sum halda fyrilesturin um virksemið á heiminum.

Á Føroya Barnaheimi eru tvær deildir. Familjudeildin og Barna- og Ungdómsdeildin, og verða umboð fyri báðar deildirnar við á fundinum.

Umboðini eru Djóni Weihe Joensen, Finnur Helmsdal og Hallbjørg Lamhauge.

Fyrilesturin er liður í eini røð av smærri tiltøkum, sum Kongshavnar Kvinnufelag javnan skipar fyri. Seinastu tíðina hevur Kongshavnar Kvinnufelag skipað fyri millum annað fyrilestrum um siðamisbrot, diabetikarar, og kostráðgeving. Í komandi mánaða fer Diana Borgnyardóttir at tosa um ymisk viðkomandi evni, serstakliga við atliti til áhugamál hjá kvinnum og kvinnuspurningum. Boðað verður nærri frá hesum fyrilestri seinni.


J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo



JÓLABORÐHALD

Komið við á sera hugnaliga JÓLAFERÐ við Norrönu og haldið Jólaborðhald umborð.

Prísur fyri hvønn
úr kr. 600,-
Matur & drekka ikki íroknað

JÓLA-CRUISE ERU HESAR DAGAR:

- 20.–24. nov.
- 27. nov. –1. des.
- 4.–8. des.
- 11.–15. des.

UNDIRHALD
MATUR

**Úr havinum**
Stórt sildaborð
Roykt og urtaviðgjørdur laksur
Rækjur og skeljadjór

**Alskyns steikir so sum:**
Stokt dunna við súreplum og sviskum
Fleskasteik við reyðkáli
Roastbeef við remuladu og stoktum leyki
Heilstokt lambstjógv
Heilstoktur oksaháryggur

**Flógvir rættir so sum:**
Tartelettir við góðari fyllu
Fiskaflak við remuladu
Nýstoktar frikadellur við reyðkáli

**Stórt ostaborð**
Við stórum úrvali av ostum, víndrúvum o.l.

**Dessertborð við m.a:**
Heimagjørt rís à la'mande við kirsiberjasós
Fruktsalat við rákremi
og alskyns køkur

Umframt stórt jólaborðhald, verður hvørt kvøld undirhald við føroyskum bólkum og einstaklingum.

**20. – 24. Nov:**
**Undirhald:** Robert McBirnie
**Orkestur:** Jóan Magnus Band

**27. Nov.– 01.Des:**
**Undirhald:** Hilmar Jan Hansen
**Orkestur:** Havkallar v/m.ø. Ronnie Nielsen

**04. – 08. Des:**
**Undirhald:** Robert Mc.Birnie
**Orkestur:** Vestmenn

**11. – 15. Des:**
**Undirhald:** Hilmar Jan Hansen
**Orkestur:** Terje Rasmussen Band

JÓLAKEYP
HUGNI

Keypið jólagávurnar á ferðini
Meðan Norröna liggur í Hanstholm verður skipað fyri innkeypstúri til Thisted.



SMYRIL LINE